# Sendistovan og Altingið eru grannar



Íslendska parlamentið, Altingið, sær ikki út av so øgilga nógvum, men stendur sjálvandi væl fyri í býnum út ímóti tí hugnaligu tjørnina í Reykjavík. Húsið, sum rúmar 63 tinglimum, er teknað av F. Meldahl og bygt í 1881. Beint við síðuna av liggur plássið, Austurvellir, har grundleggjarin av býnum, Ingólfur Arnarson, eftir øllum at døma hevði garð sín. Her stendur ein minnisvarði yvir filologin, Jón Sigurðsson, sum livdi fra 1811 til 1879, og sum stóð á odda fyri frælsisstríði Íslands. Tá landið fekk endaligt sjálvstýri í 1944, varð hetta gjørt á føðingardegnum hjá Jón Sigurðarsson 17. juni. Føroyska sendistovan liggur væl fyri beint hinumegin grasfløtuna frammanfyri Altinginum. Hendan fløtan verður oftani brúkt til mótmælistiltøk móti íslendskum politikki.


























